## Carl Johan Jensen

**47 ára gamli rithøvundurin hevur í mong ár markerað seg í føroyska bókmentaheiminum. Fyri tey flestu verður hann settur í samband við bersøgna, kritiska og provokerandi ummælaran, sum ikki fýrir fyri at sveiggja øksina, siga sína hugsan og vera náðileysur, tá hann viðgerð bøkur og rithøvundar. Umstríddi blaðmaðurin, rithøvundurin, týðarin og ummælarin er ein maður, tey flestu hava eina meining um "på godt og ondt".**



# Stillføru brøðurnir v

Teir hava sínar greiðu meiningar, teir hava v
sítt. Sosialurin hevur hitt umstríddu provo-
Jensen sum fyrsta systkinaparið í grein

SAMRØÐA
*Heini í Skorini*
*heini_skorini@yahoo.com*

*Lat okkum byrja við at biðja tykkum stutt lýsa tykkum sjálvar?*

**Mikkjal:** Eg eri á ein hátt eitt privat menniskja, sum havi lyndi til at halda meg aftur frá støðum, har nógv fólk eru savnaði og í staðin vera fyri meg sjálvan. Tað fellir mær náttúrligt at stilla meg á síðulinjuna og taka leiklutin sum eygleiðari heldur enn luttakari.

Men av tí sama havi eg kanska leitað mær til tað mótsatta í mínum vali av yrki og havi miðvíst lagt meg eftir at arbeiða í umstøðum, har eg havi verið noyddur at taka ein meiri "úteftirvendan" og sosialan leiklut, eitt nú sum sjónleikari, undirvísari ella leiðari.

Samstundis meti eg meg vera ambitiøsan. Mær dámar væl avbjóðingar, og tað, eg farið í holt við, ynski eg at gera 100%.

**Carl Johan:** Á sama hátt sum Mikkjal eri eg ein afturlatin typa, og eg fái av og á at vita, at eg eri í so afturlatin. Men mótvegis honum havi eg eisini valt eitt einsligt yrki sum rithøvundur. Eg seti mær høg mál og krevji høgt støði við tí, eg fáist við. Men hóast mína afturlatnu náttúru geri eg vart við meg og sigi mína meining hart og kontant, tá eg meti tørv vera á tí.

*Hvussu kunnu tit harafturímóti lýsa hvønn annan?*

**Mikkjal:** Carl Johan ynskir at gjøgnumføra tað, hann fer í holt við, hann leggur stórt arbeiði í tað, hann ger, og samstundis meti eg stórabeiggja vera gløggan. Og eg havi virðing fyri, at hann hevur valt at arbeiða burturav sum skrivandi listarmaður, meðan eg kanska heldur eri vorðin eitt karrierumenniskja innan mentanarøkið.

Skal eg nevna ein negativan eginleika, so meti eg, at honum av og á vantar virðing fyri øðrvísi áskoðanum. Hann kann vera líkasælur og ov lítið kenslusamur yvirfyri persónliga markinum hjá hansara medmenniskjum.

**Carl Johan:** Mikkjal torir at standa við sítt og óttast ikki at siga tað, hann metir vera rætt. Alt SVF-málið prógvar, at hann torir at skera ígjøgnum, og hóast eg ikki havi verið samdur við avgerðunum hjá Mikkjali, havi eg virðing fyri hansara eginleika at tora at hava eina greiða áskoðan og bera seg at sambært síni sannføring.

Hinvegin er Mikkjal sera eigukærur og heldur sera fast við tað, sum hann metir vera hansara rættur ella hansara ogn.

*Hvørjir eru so líkleikarnir og mótsetningarnir millum tykkum báðar?*

**Mikkjal:** Báðir eru vit ógvuliga treiskir, og vit eru ikki lættir at vika frá teimum áskoðanum, sum vit – hvør í sínum lagi – hava.

Viðvíkjandi mótsetningum okkara millum hevur Carl Johan valt eina meiri reserveraða lívsleið, meðan eg í størri mun havi ferðast í sosiala rúminum í mínum dagliga arbeiði. Og so kann eg ikki lata vera við at nevna, at eg haldi meg vera meiri diplomatiskan enn hann.

**Carl Johan:** Ja ja, men í mínum starvi havi eg heldur ikki havt fyri neyðini at vera diplomatiskur í sama mun sum tú, tí eg livi jú av at siga mína egnu erligu meining. Men aftur til spurningin um líkleikar og munir, so minna lyndi okkara um hvørt annað, hóast ymsu yrkisleiðirnar avmynda munirnar okkara millum. Mikkjal hevur valt sosial umhvørvi og hevur eftirhondini staðið á odda ymsastaðni í sínum yrki, men ein stjórasessur hevði absolutt ikki verið nakað fyri meg. Men tað er so nakað heilt annað, at eingin hevði nokk heldur valt meg til sjónvarpsstjóra.

*Hava tit báðir eitt tætt forhold?*

**Mikkjal:** Tað eru sjey ár á muni millum meg og Carl Johan, og vit komu í grundini ikki at kennast, fyrrenn eg var tannáringur, tí hann frammanundan hevði tikið studentsprógv í Danmark. Í dag finna vit sera væl út av tí saman, hóast vit ikki umgangast so nógv í gerandisdegnum.

**Carl Johan:** Vit búgva í hvør sínum enda av býnum og síggjast ikki so ofta, men vit práta væl saman, og mær dámar væl at vera saman við Mikkjali.

### Ábyrgdarleys tjóð

*Fyri at kasta meiri ljós á tykkara almenna profil, hava tit so nakra ítøkiliga frágreiðing um, hví tit báðir hava markerað tykkum, og hví tit báðir meiri enn einaferð hava verið í andglettinum í almenna kjakinum?*

**Mikkjal:** Eg meti tað vera eitt samanfall av fleiri viðurskiftum, men leiklutirnir hjá mær og Carl Johan kunnu ikki samanberast. Meðan mín uppgáva sum almennur stjóri hevur verið at finna loysnir í einum felagsskapi og sett framtíðina hjá Sjónvarpi Føroya á dagsskránna við grundgevingum, sum øll kunnu fyrihalda seg sakliga til, hevur Carl Johan arbeitt sjálvstøðugt og kunna loyvt sær at vera persónligur.

Men kanska felagsnevnarin er at finna í, at vit báðir hava havt eina konsekventa meining og insisterað uppá konsekvens. Vit hava møguliga á hvør sínum øki skumpað nøkur sjónarmið fram fyri at fáa eina reaktión. At hava eina greiða og konsekventa meining er í grundini nóg mikið til at fáa umrøðu í einum so lítlum samfelag sum okkara, og tað hava vit báðir havt.

**Carl Johan:** Tað eru møguliga nøkur felagseyðkenni millum meg og Mikkjal, hóast leiklutir okkara ikki kunnu samanberast, við tað at vit hava markerað okkum undir heilt ymsum fortreytum og í hvør sínum høpi. Sum Mikkjal sigur, skal tað í

### Fakta um Carl Johan

Føddur :1957
1976: Studentaprógv
1976: hálvt ára lestur í gudfrøði
1977-79: blaðmaður, timburlærlingur, lossingarmaður, lærlingur hjá landsverkfrøðinginum
1979-84: cand.phil. við høvuðsgrein í føroyskum
1985-2004: Rithøvundur, týðari, blaðmaður og ummælari.
Búsitandi í Íslandi, Noregi, Føroyum og Australia